# Ein morgun í tveimum útgávum

**»Morgun« er nýggj lesivenjingarbók, ið er ætlað 1. til 3. flokki. Bókin er í tveimum útgávum. Onnur løtt lisin og hin eitt sindur torførari**



BÓKAÚTGÁVA
*Ingi Rasmussen*

Føroya Skúlabókagrunnur gevur út nýggja lesivenjingarbók til byrjanarlesing. Bókin eitur »Morgun«. Sólrun Michelsen hevur skrivað, og Olivur við Neyst hevur teknað.

Tað serliga við hesari bókini er, at hon er prentað í tveimum ymiskum útgávum. Onnur er løtt lisin bók við einari fjøður á permuni til næmingar, ið hava heldur ilt við at lesa, og hin er miðal torfør bók við tveimum fjaðrum á permuni til teir næmingar, ið hava lætt við at lesa.

Hetta átti at gjørt tað lættari hjá næmingum at laga undirvísingina til einstaka næmingin, samstundis sum allir næmingar floksins kunnu lesa somu bók á ymiskum toreikastigi, sigur Skúlabókagrunnurin.

»Morgun« er gul snípubók, ið er ætlað 1. til 3. flokki. Bókin er ætlað sum ískoyti til lesibókina, og tí eru høvuðspersónarnir í søguni nevndir Hervør og Høgni sum í lesibókini. Føroya Skúlabókagrunnur ætlar at geva fleiri tílík lesivenjingarhefti út sum ískoyti til vanligu lesibøkurnar til byrjanarundirvísingina í føroyskum.

Snípurøðin er eitt samstarv millum Føroya Skúlabókagrunn og Bókadeild Føroya Lærarafelags, har bøkur ætlaðar til lesivenjingar verða flokkaðar eftir torleikastigi.

»Morgun« er 26 blaðsíður og kostar 36 krónur hvør bókin.

# Orðabókafrøðingar kunnu frøast

**Nýggj bók um orðabókafrøði og orðabókagerð er útkomin í Føroyum. Tað er tann sjeynda í røðini, sum Norðurlendskt felag fyri orðabókagerð gevur út**

BÓKAÚTGÁVA

Nú kunnu føroyskir orðabókafrøðingar frøast, tí ein nýggj bók um orðabókafrøði og orðabókagerð er útkomin her á landi.

39 fyrilestrar eru prentaðir í bókini. Teir vóru allir hildnir á stóru orðabókaráðstevnuni, sum varð hildin í Norðurlandahúsinum í Føroyum í døgunum 21.-25. august 2001.

Fýra av hesum fyrilestrum nomu við Føroyar. Italumaðurin Gianfranco Contri, ið eina tíð hevur fingist við at gera eina føroyska-italska orðabók, helt fyrilestur um arbeiði sítt.

Jógvan í Lon kallaði sín fyrilestur »Leksikografi og terminologi – to sider af samme sag?«. Johnny Thomsen og Ulf Timmermann, sum hvør í sínum lagi arbeiða við ávikavist eini russiskari-føroyskari og einari føroyskari-týskari orðabók, hildu eisini hvør sín fyrilestur.

Bókina við fyrilestrum hava Zakarias S. Hansen og Anfinnur Johansen á Føroyamálsdeildini ritstjórnað. Hestprent hevur prentað. Bókin telur 418 síður og kostar 200 krón-ur.

Orðabókaráðstevnan, ið hildin varð í Føroyum, er tann sætta í røðini. Alt byrjaði við einari ráðstevnu í Oslo í 1991, tá norðurlendskt felag fyri orðabókagerð varð stovnað. Endamál felagsins er at fremja verkligt og vísindaligt orðabókastarv í Norðurlondum og at menna norðurlendskt orðabókasamstarv. Øll, ið hava áhuga fyri orðabókamálum, kunnu gerast limir.

# Fleiri pengar millum hendurnar



*Skattalættin virkar frá 1. januar 2003. Samstundis verða lyfti givin um meira skattalætta næstu árini*

**Tað verður helst eitt einmælt løgting, sum atkvøður skattalættan ígjøgnum. Skattalættin merkir einar 4 til 5000 krónur í lægri skatti til verka-, handverkara- og starvslønir í ár. Andstøðan tekur undir við uppskotinum, men vísir samstundis á, at skattatrýstið er hægri í dag enn í 1997. Samgongan lovar meira skattalætta næstu árini**

SKATTALÆTTI
*Ingi Rasmussen*

Føroyingar fáa fleiri pengar millum hendurnar. Sum væntað taka bæði samgonga og andstøða undir við skattalættanum, sum er borðreiddur í løgtinginum.

Hósdagin var skattalættin, sum tilsamans er einar 125 milliónir krónur í hesum árinum, til viðgerðar í løgtinginum. Og har kom greitt fram, at tað helst verður eitt samt ting, sum fer at taka undir við skattalættanum, tá av tornar.

Fíggjarnevndin, sum hevur viðgjørt uppskotið, tekur øll undir við uppskotinum, hóast sjónarmiðini eru ymisk.

## Meira seinni

Samgonguumboðini, Óli Breckmann, Kristina Háffos og Kári P. Højgaard, vísa til samgonguskjalið, har sagt verður, at »neyðugt er at linka skattin til at lætta um hjá familjum og einstaklingum, til at lækka kostnaðarstøði og til at bøta um reallønina og styrkja kappingarføri«.

Uppskotið merkir millum 4.000 og 5.000 krónur í skattalætta um árið hjá einari verka-, handverkara- og starvsmannaløn, vísir meirilutin á.

– Ein króna spard í skatti svarar sum kunnugt til umleið tvær krónur í hægri realløn. Hesin árligi 4-5.000 krónu skattalættin vigar tað sama sum ein brutto lønarhækkan upp á nærum tað dupulta, nevniliga 8-9.000 krónur um árið meiri í løn hjá hvørjum løntakara. Hesin skattalættin er liður í einum langtíðar skattapolitikki, ið hevur til endamáls at lækka skattin á arbeiði. Væntast skal tí í samsvari við samgonguskjalið eina framhaldandi minking í skattatrýstinum í 2005 og 2006, siga samgonguumboðini, sum mæla løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

## Hægri skattur

Tað gera andstøðuumboðini, sum eru Vilhelm Johannesen, Listbeth L. Petersen og Johan Dahl, eisini, men tey vísa á, at skattatrýstið í dag er hægri enn í 1997.

– Hetta kemst av, at hámarksinntøkurnar á tí progressiva skattastiganum hava verið hækkaðar so lítið, at ein lønmóttakari við vanligum lønarvøkstri beinanvegin hevur rent seg aftur í nýggju inntøkuloftini. Endamálið við progressiva skattastiganum er, at tær breiðastu herðarnar skulu bera tær tyngstu byrðarnar, men tað virkar júst øvugt. Tað eru miðalinntøkurnar, sum alla tíðina renna seg ímóti inntøkuloftinum, sigur minnilutin.

Hann vísir eisini á, at ein stórur partur av tímaløntum, serliga innan fiskavirking, fáa vanliga ikki 40 tíma viku. Hesi eru tey veruligu lágløntu, sum ongin skattalætti verður latin.

– Vit mugu staðfesta, at skatturin er hægri nú, enn hann var í 1997, og tað er als ikki nøktandi, tá havt verður í huga, at búskapurin hesi seinastu árini hevur verið í støðunum vøkstri, siga Vilhelm Johannesen, Lisbeth L. Petersen og Johan Dahl.

Tey taka kortini undir við uppskotinum, men mæla samstundis til, at skattaskipanin verður endurskoðað.

Skattalættin verður afturvirkandi frá 1. januar 2003.

### Fakta

**Ár 2003:**

Skattur av tí fyrsta inntøkuintervallinum í skattastiganum - t.e. inntøka úr 21.000 upp í 65.000 kr. - verður eftir uppskotinum 0 kr. av 21.000 kr. og 8,0% av restini av inntøkuni upp til 65.000 kr.

Skattur av øðrum inntøkuintervalli - t.e. inntøka úr 65.000 upp í 120.000 kr. - verður 3.520 kr. av 65.000 kr. og 19% av restini av inntøkuni upp til 120.000 kr.

Skattur av triðja inntøkuintervalli – t.e. inntøka úr 120.000 upp í 160.000 kr. – verður 13.970 kr. av 120.000 kr. og 23,5% av restini av inntøkuni upp til 160.000 kr.

Skatturin av fjórða inntøkuintervallinum – t.e. inntøka oman fyri 160.000 kr. – verður 23.370 kr. av 160.000 kr. og 37% av restini av inntøkuni oman fyri 160.000 kr.



# Krevja lønarhækking upp á 24 krónur um tíman

*Arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnir eru farnir undir samráðingar um nýggja sáttmála. Arbeiðarafeløgini krevja eina lønarhækking upp á 24 krónur tey bæði næstu árini. Sáttmálin er úti mikukvøldið á midnátt, men enn gongur ongan veg við samráðingunum*



**Arbeiðarafeløgini hava kravt eina lønarhækking upp á 12 krónur um tíman í ár og 12 krónur afturat næsta ár. Men enn gongur ongan veg við samráðingunum**

LØNARSAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*

Ein lønarhækking upp á 12 krónur afturat um tíman 1. mai í ár og 12 krónur afturat 1. mai næsta ár.

Tað eru krøvini, sum tey fimm arbeiðarafeløgini hava lagt fyri arbeiðsgevararnar, nú samráðingarnar um ein nýggjan sáttmála eru byrjaðar.

Sostatt eru krøvini ein lønarhækking uppá 24 krónur tilsamans hesi bæði næstu árini.

Roknað um til prosent, gevur tað eina lønarhækking uppá 13% í ár og 11,5% afturat næsta ár.

Men harumframt hava arbeiðarafeløgini eisini kravt aðrar ábøtur í sáttmálanum.

Ingeborg Vinther vísir til almenna arbeiðsmarknaðin og heldur, at tað er stórur munur á, hvat hann hevur verið lagaligari at geva sínum fólkum góðar sømdir enn privati arbeiðsmarknaðurin.

Men nú vilja arbeiðarafeløgini hava, at verkafólkið verður líka væl tryggjað og krevja tey eisini at fáa ymsar ágóðar, sum eru á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Eitt nú krevja tey at fáa løn undir sjúku, rætt til at vera heima hjá sjúkum børnum o.s.fr.

Harafturat krevja feløgini, at hvørt virki skal hava ein starvsfólkapolitikk og at tað skal vera betri samstarv ímillum arbeiðsfólk og leiðslu, soleiðis at arbeiðsfólkið altíð veit hvat fer fram á arbeiðsplássinum.

## Førir til lønarniðurskurð

Hinvegin hava arbeiðsgevararnir eisini síni krøv. Eitt nú hava teir sett fram aftur ynski um at tað skal bera til at arbeiða forskotna tíð, uttan at gjalda yvirtíð.

– Hetta eru alt krøv, sum føra til beinleiðis lønarniðurskurð og tað góðtaka vit ikki. Vit eru farin til samráðingar fyri at gera sáttmálan betri og ikki fyri at gera støðuna hjá verkafólki verri, sigur Ingeborg Vinther.

Nakrir samráðingarfundir hava verið, men Ingeborg Vinther sigur, at tað gongur strilti.

– Semja er fingin um onkur smávegis mál, sum onki kostar nøkrum parti, sigur hon.

Men tað er onki óvanligt, at tað gongur strilti við samráðingunum og tað plagar ikki at vera fyrrenn í síðstu løtu, at ein verulig ábending fæst um, antin tað ber til at fáa ein sáttmála yvirhøvur, ella um arbeiðið aftur verður niðurlagt.

## Støðið er lagt

Hesuferð samráðast øll fimm arbeiðarafeløgini saman. Tey eru Føroya Arbeiðarafelag, arbeiðsmanna- og arbeiðskvinnufelagið í Havn og tey bæði feløgini í Klaksvík og hetta heldur Ingeborg Vinther vera eina stóra styrki.

Ingeborg Vinther hevur fyrr víst á sáttmálan ímillum Maskinmeistarafelagið og SEV, sum gav maskinmeistarunum góð 10% í lønarhækking tey bæði næstu árini.

Vanligt er, at tann fyrsti sáttmálin leggur støði og niður um tað, ætla arbeiðarafeløgini ikki at fara, sigur hon.

Men hon heldur, at tað er ikki rætt at tosa um eina lønarhækking uppá 10% til arbeiðarafeløgini, tí maskinmeistararnir fáa frammanundan hægri løn. Ti eru 10% av teirra løn ein hægri lønarhækking enn 10% eru av eini arbeiðaraløn.

Fyri ikki at gera munin á lønunum hjá faklørdum og ófaklærdum enn størri, hava arbeiðarafeløgini tí sett eitt sett krøvini fram í krónum, heldur enn í prosentum.

Í løtuni er vanlig tímaløn 92,20 krónur.

# Tríggir røðarar á Vaglinum

Hósdagin er 1. mai og sum kunnugt er tað altjóða arbeiðaradagurin.

Og sum vanligt, verður Havnar Arbeiðsmannafelag aftur í ár at skipa fyri 1.mai dagshaldi á Vaglinum.

Fyrst fer nývaldi formaður felagsins, Hans Joensen, at bjóða vælkomið.

Síðani fara tríggir røðarar at siga sína hugsan um korini hjá verkafólkinum. Teir vera Sakaris Hansen, arbeiðsmaður og nevndarlimur í Havnar Arbeiðsmannafelag, Ingeborg Winther, forkvinna í Føroya Arbeiðarfelag og Petur Skarsá, arbeiðsmaður.

Og sum vant fer Havnar Hornorkestur aftur í ár at seta sín serliga dám á meidagshaldið.

**–Áki–**

# Gongur sína gongd

**Samráðingartónin er vinaligur og tað gongur, sum tað plagar, siga arbeiðsgevararnir**

LØNARSAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*

– Eg kann bara siga, at tað gongur sum tað plagar.
Jan Mortensen, sum er ein av samráðingarfólkunum hjá arbeiðsgevarunum, er ikki serliga tíðindafróður um samráðingarnar, sum eru í løtuni við arbeiðsgevararnar.

Hann sigur, at partarnir hava avtalað ikki at siga nakað um smálutir í samráðingunum, ella um krøv og mótkrøv.

Men hann sigur, at gongd er í samráðingunum og tónalagið við borðið er vinaligt.

Kravið upp á 12 krónur í ár og 12 krónur afturat næsta ár, vil hann sostatt heldur ikki geva viðmerkingar til.

Men hann vísur eisini til sáttmálan ímillum SEV og Maskinmeistararnar, sum gav maskinmeistarunum góð 10% tey bæði næstu árini.

Men Jan Mortensen vil ikki vera við, at hesin sáttmálin skal leggja støðið fyri teir sáttmálarnar, sum koma.

Tá ið sáttmálin við Maskinmeistararnar varð gjørdur, átalaði Vinnuhúsið SEV fyri at hava gjørt so høgan sáttmála.

– Vit hava gjørt vart við, at privata vinnan hevur ikki ráð til at veita so stóra lønarhækking, sum tað vísir seg at ein fyritøka við einkarrætti hevur ráð til , sigur hann

– Er tað so, at tit hava fingið at vita, at kravið frá arbeiðarafeløgunum er 24 krónur um tíman, kunnu tit sjálvi rokna út, hvørja støðu vit hava til tað, sigur Jan Mortensen, í stuttari viðmerking til samráðingarnar.